HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Laborantur

Vegna munandi økt virksemi søkir Heilsufrøðiliga starvsstovan eftir laboranti til mikrobiologisku kanningarstovuna. Starvið, sum er fulla tíð, fevnir um vanligar mikrobiologiskar kanningar av mati, drekkivatni og øðrum. Seinni kann starvsøkið møguliga broytast.

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar mikrobiologiskar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru ein fyrimunur, men eingin treyt. Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum.

Umsókn til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinsta lagi 20. mars 2000. Starvið verður sett 1. apríl ella skjótast til ber.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Birnu Mørkøre, deildarleiðara, tlf. 315300.

Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Laborantnæmingur

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir laborantnæmingi. Starvið, sum er avmarkað til starvsvenjingartíðina í eitt ár, er á kemisku kanningarstovuni.

Kemiska kanningarstovan ger eitt breitt úrval av kemiskum kanningum innan matvøru-, drekkivatns- og umhvørvisøkið. Kemiska kanningarstovan er altjóða góðkend eftir EN 45001 til ávísar kemiskar kanningar og arbeitt verður eftir góðkendum fyriskipanum.

Tú skalt hava lokið tann bókliga partin av laborantútbúgvingini. Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærløgd/nærlagdur og duga at arbeiða miðvíst.

Starvið, sum skal setast sum skjótast, verður lønt sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, tvs. 70% av 1. stigi í 15. flokki.

Umsókn til starvið, við avriti av fyribils prógvi, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. mars 2000.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Maritu Poulsen, deildarleiðara.

Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo

NORÐURLANDAHÚSIÐ

Tiltøk í mars 2000

Leygardagur 4. mars **kl. 16.00**
Íslendska fotoframsýningin »Ljósalfar« letur upp. Fotomyndirnar eru úr Føroyum. Framsýningin er í húsinum til 26. mars.

Mikudagur 8. mars **kl. 19.30**
Altjóða kvinnudagur v/ fyrilestri, sangi og upplestri. Kvinnufelagið í Havn skipar fyri.

Sunnudagur 12. mars **kl. 16.00**
Dansiframsýning v/ Reijo Kela, Finnland

Leygardagur 25. mars **kl. 19.30**
Rytmiska Kórið í Hoydølum framførir »Hair«.

Sunnudagur 26. mars **kl. 16.00**
Jazzkonsert. Fyriskipari er TUTL.

Fríggjadagur 31. mars **kl. 19.30**
»Oceanic Days«. Symfoni nr. 1.
Tónaskald: Sunleif Rasmussen.
Dirigentur: Bernharður Wilkinson.
Symfoniorkestur: Sinfóniuhljómsveitar Íslands.

Broytingar í skránni kunnu koma fyri.

Norðurlandahúsið í Føroyum er opið gerandisdagar kl. 10-18 sunnudagar kl. 14-18.

Telefon 317900 • Fax 319790
e-mail: nlh@nlh.fo • http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

Norðurlandahúsið í Føroyum

FRAMSÝNINGS-KØKUR TIL SØLU



Vanl. prísur 26.756,-

NÚ BERT 12.995,-

Sosialurin - 311820

HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi - FO 110 Tórshavn - Tel. 314949 - Fax 311330
E-mail: hthdul@post.olivant.fo

Suðuroyar Sjúkrahús

Søkt verður eftir frítíðaravloysing á skurðgongini í tíðarskeiðnum frá 1. mai til 31. august 2000.

Umsøkjarin skal hava royndir sum sjúkrasystir á skurðgongd.

Talan er um starv í fullari tíð, við tilkallivaktum frá heimi.

Løn- & setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

Umsjónarmannin
Suðuroyar Sjúkrahús
Postrúm 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist: 21. mars 2000.

Húsavørður

Søkt verður eftir húsavørði til Runavíkar Kommunuskúla, at byrja 1. apríl 2000.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:

- At røkja skúlabygningarnar og økini uttan um skúlarnar
- Gera ymisk viðlíkahaldsarbeiði
- Syrgja fyri at ljós-, hita- og sanitetsviðurskiftini í skúlunum eru í lagi
- Hava umsjón við reingerðingini á skúlunum
- Annað fyrifallandi arbeiði

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyðun Petersen á Teknisku Umsiting, tlf. 447035.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi handverkaraútbúgving.

Umsókn, saman viðupplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 20. mars 2000.

Umsóknin skal vera merkt »húsavørður«.

Runavíkar Býráð

Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

☎ 212380

sosialurin -har tað hendir

Ein løta av teimum stóru

Sunnudagin 27. februar kl. 16.00 var áhugaverd konsert í Nor›urlandahúsinum, har ungir framkomnir næmingar í musikkskúlanum spældu saman vi› Føroya Symfoniorkestri fyri nærum fullsettum sali.

Mitt í januar var kapping millum 16 framkomnar næmingar í musikskúlanum um at sleppa at spæla saman vi› Føroya Symfoniorkestri. Seks næmingar vóru tiknir út. Teir spældu sunnudagin saman vi› orkestrinum fyri okkum verk eftir Vivaldi, Haydn, Mozart, Beethoven og Bellstedt.

Tiltaki› var úrslit av einum samarbei›i millum føroysku musikkskúlaskipanina og orkestri›.

Sigast má, at hetta var ein uppliving sum sjálvdan á›ur í Nor›urlandahúsinum.

Associted Board (AB)

Hetta er altjó›a prótøkuskipan fyri næmingar í tónleiki, frá teimum á byrju-narstigi til teir á høgum, framkomnum stø›i.

Eisini her í Føroyum ver›ur skipanin n‡tt av teimum, sum hava hug til tess. Hetta ber í sær, at próvdómarar koma úr Bretlandi eina fer um ári› at lurta eftir, um næmingarnir lúka treytirnar at sleppa upp áeitt hægri stig. Stigini eru frá eitt til otta.

Teir ungu solistarnar

Gu›ny Brynhild Næs úr Havn, sum spælir violin, spældi á konsertini romansu í F-dur eftir Beethoven. Hon er 17 ára gomul og hevur spælt violin, sí›an hon var 7 ár. Hon hevur tiki› 8. stigi› í AB. Vári› 1998 vann hon 3. vir›isløn í »Berlingske klassiske musikkonkurence« í Keypmannahavn. Lærarar hjá Gu›ny hava ver›i Lis Havelund, Nikolaos Kapnas og sí›stu 5 árini, Sámal Petersen.

Marjun Herup Olsen úr Havn, sum spælir tvørfloytu, spældi 1. sats úr floytukonsert í G-dur eftir Mozart. Hon er eisini 17 ára gomul og hevur spælt floytu í 10 ár. Hon hevur tvær fer›-ir luttiki› í kappingini hjá »Berlingske« og vann ávikavíst 2. og 1. vir›isløn. Lærarar hjá Marjun hava ver›i Ernst Sondum Dalsgar›, og sí›stu 6 árini, Andrea Heindriksdóttir.

Jón Festirstein Olsen úr Havn, spælir violin. Hann spældi 1. sats úr violinkonsert í a-moll eftir Vivaldi. Hann er 14 ára gamal, og hevur spælt violin í 4? ár. Hann hevur tiki› 4. stigi› í AB. Vári› 1999 vann hann 3. vir›isløn í »Berlingske« kappingini. Lærari hjá Jóni er Sámal Petersen.

Kristina Dalsgar› av Argjum spælir klaver. Hon spældi 1. sats úr klaverkonsert í D-dur eftir Haydn. Hon er 15 ára gomul, og hevur spælt klaver seinastu 7 árini. Hon hevur í Danmark luttiki› meira enn eina fer› í Steinway kappingini fyri ungdómar. og vann eitt ári› 2. vir›isløn. Lærarar hjá Kristinu hava ver›i Connie Kjeldsen, Stamen Stantchev, og frá 1997, Jóhannes Andreasen.

Andrea á Dul Mortensen av Argjum, spælir eisini klaver. Hon spældi 3. sats úr somu klaverkonsert. Hon er 18 ára gomul og hevur spælt klaver í eini 10 ár. Hon hevur eisini í fleiri ár nomi› sær kunnleika at spæla tvørfloytu, men er nú givin vi› tí. Andrea gekk sí›sta vetur á High School í Arkansas í USA, har hon eisin nam sær kunnleika í klaverspæli. Hon hevur tiki› lut í fleiri kappingum uttanlands og hevur fingi› gó› úrslit bæ›i í Nor›urlondum og í USA.

14 ára gomul spældi Andrea sína fyrstu solokonsert í Útvarpshølluni. Hettavar í sambandi vi›, at hon skuldi luttaka í eini kapping í Svøríki. Lærarar hjá Andreu hava ver›i Connie Kjeldsen, Stamen Stantchev, William Medley, og frá 1997, Jóhannes Andreasen.

Sí›stur á skránni var Johan Hentze úr Kambsdali, sum spælir trompet. Hann spældi lagi› Napoli vi› variatiónum eftir H. Bellstedt. Hann er 14 ára gamal, og hevur spælt trompet í 5 ár. Hann hevur tiki› 5. stigi› í AB. Johan er útvaldur at umbo›a Føroyar í »The Europan Youth Brass Band« sum fer at spæla í Birmingham í apríl komandi. Sama orkestri› fer at luttaka á europæisku kappingini fyri ungdómsorkestur, sum eisini ver›ur í Birmingham.

Lærarar hjá Johan hava veri› Graeme Rudd, og seinast, Sharon Fisher.

Konsertin

Eg fari ikki at taka dagar ímillum teir einstøku solistarnar og teirra avrik, men bert sta›festa, at avrikini sum heild vóru hugtakandi, bæ›i tekniskt og musikalskt. At hugsa sær, at vit í dag eiga so nógv ungfólk á so høgum stø›i á teirra ljó›føri. Hesi seks eru bert toppurin á ísfjallinum.

Hini tíggju flóta yvaleyst eisini omaná. Og so allir hinir 1100 mæmingarnir sum ganga til tónleikaundirvísing. Av teimum ver›a yvaleyst fleiri, sum fara at náa líka langt.

Hetta at »náa langt« er tó ikki høvu›sendamáli› vi› at læra at spæla. So kundu tey flestu givist beinanvegin. Høvu›sendamáli› er at hava gó›ar løtur saman vi› sínum ljó›føri, putla einsamallur vi› at fáa tingini at rigga, og samstundis uppliva musikkin. Og eisini at spæla saman vi› ø›rum. Hetta gevur gó›ar »heimamusikarar«, musikkelskarar og konsertgangarar. Tú hevur eisini tí› til anna›. Og ta› er gott. Hinvegin, ver›ur tú bitin av at spæla, heldur ta› vera ta› besta sum er, ja, so er stø›an ein onnur.

Tín dreymur ver›ur at spæla so væl, at onnur tíma at lurta eftir tær. Tú vilt fegin spæla á konsertum, og fólk skulu entá gjalda fyri at lurta. Tá ræ›ur um at gera sítt besta, hevur tú vir›ing fyri tær sjálvum og áhoyrarunum.Her kemur Associted Board og kappingar inn í myndina. Hetta fær næmingar, sum hava áhuga tann vegin, at ‡ta sítt besta. Eg minnist tá núver›andi musikkskúlaskipanin kom. Hetta var fyrst í 80,- árunum. Á›renn var tónleikaundirvísingin á fáum hondum og tali› á næmingum samsvarandi líti›. Stovnanin av musikkskúlanum gjørdi, at alt sprongdist vi›-víkjandi lærarartali og harvi› eisini næmingatali›.

Minnist meg rætt, vóru einir 45 musikklærarar, tá best stó› til. Í kreppuárunum var› hetta skori› ni›ur í eina helvt. Lærarartali› er í dag umlei› 25, og næmingatali› o.u. 1100. Hetta sí›sta tali› er at frøast um. - Men! - Bí›ilistin er o.u. 900 børn um alt landi›,sum fegin vilja sleppa at spæla, so-lei›is sum vinma›urin ella vinkonan sleppa. »Hví sleppur hon og ikki eg?« Ein rættuliga óheppin stø›a.

Sum omanfyri nevnt var salurin í Nor›urlandahúsinum nærum fullsettur sunnudagin. Vónandi vóru onkrir av teimum har, sum játta pening til musikkskúlan. Tá upplivast kann, hvat kann koma burtur úr einari mi›-vísari tónleikaundirvísing, bæ›i fyri tann staka næmingin og eisini fyri okkum áhoyrarar og samfelagi› sum heild, má ni›urstø›an vera, at her mugu øll, sum hava hug, sleppa framat.

At enda ein tøkk til lærarar musikkskúlans fyri teirra dygdararbei›i.

Árni Hansen